## Bridge givin á landsliðnum

Wayne Bridge hevur nú sagt alment, at hann ikki vil vera partur av enska fótbóltslandsliðnum. Hetta tí ósemjan millum hann og John Terry, sum gjørdi unnustuna hjá Bridge við barn, er ov stór. – Eg havi hugsað leingi um mína støðu á enska landsliðnum. Fyri meg hevur tað altíð verið ein heiður at spæla á landsliðnum, men støðan í dag er ikki haldbar, og hon kann skapa ov nógv split í hópinum. Tí er tað besta fyri liðið, at eg ikki eri í hópinum, sigur Bridge.



## 16 ferðir nummar fýra

Týska Daniela Anschütz-Thomas gjørdist nummar fýra á 5.000 metrum á skoytum í OL, og tað er ikki løgið, um hon eftir hondini kennir seg heldur óhepna á ísinum. Hetta var nevnliga 16. ferðin, at 35 ára gamla týska skoytukvinnan verður nummar fýravið EM, HM ella OL, og hevur hon soleiðis einki heiðursmerki í heimsins størstu kappingum at vísa á. Og lagið mundi ikki verða betri, tá endaligu tíðirnar vórðu kunngjørdar. Munurin upp til bronsuna var nevnliga lúsa 3/100 sekund.

# Ensk feløg skylda nógv mest



Saman við Manchester United stendur Liverpool fyri triðingini av skuldini hjá ensku fótbóltsfeløgunum

### Ensku fótbóltsfeløgini eiga heili 56 prosent av fótbóltsskuldini í Europa




Heri Simonsen

Enska blaðið, The Guardian prentaði í vikuni eina frágreiðing, sum byggir á fíggjarstøðuna hjá teimum 732 feløgunum, sum hava UEFA-lisens.

Frágreiðingin vísir, at samlaða skuldin hjá teimum ensku feløgunum er 30 miljardir krónur. Hetta hóast tey ensku feløgini hava tær størstu sjónvarpsinntøkurnar.

Tølini í frágreiðingini stava frá roknskapunum í 2007 og 2008. Frágreiðingin umfatar ikki West Ham og Portsmouth, sum ikki hava UEFA-lisens, orsaka av einari vánaligari fíggjarstøðu.

Alt talar fyri, at tølini eru økt síðani 2008. Í frágreiðingini skrivar UEFA-forsetin, Michel Platini, at heilsustøðan hjá europeiskum fótbólti, er ikki góð.

Platini hevur áður lagt eitt uppskot fram um tað, sum hann nevnir »fíggjarligt fair play«, sum skal tryggja, at tey europeisku feløginini bara hava ta inntøkuna, sum tey sjálvi hava forvunnið.

Peikifingurin verður serliga rættaður ímóti Manchester United og Liverpool, sum hava 10 miljardir krónur í skuld, tí hesi hava útlendskar eigarar.

– Okkurt má gerast fyri, at feløgini skulu klára seg. Tey ensku feløgini hava stórar inntøkur, men hava samstundis eina stóra skuld, sigur aðalskrivarin hjá UEFA, Gianni Infantino. – Tá ein lænir fyri at keypa fótbóltsspælarar, so fært tú trupuleikar við at fáa tamarhald á skuldini, tá tú ikki sleppur at lána meir, sigur Gianni Infantino við The Guardian.

### Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

28/02 14.30 VÍF-StÍF
28/02 15.00 Stjørnan-Tjaldur
28/02 15.00 VB-Neistin

**Atlantic Airways-kappingin**

28/02 16.00 H71-Neistin
28/02 16.00 VÍF-StÍF
28/02 18.00 Kyndil-KÍF

**Flogbóltur**

**Eik-ligan, kvinnur**

28/02 14.00 Mjølnir-KÍF
28/02 14.00 ÍF-Fleyr
28/02 15.00 SÍ-TB

**Eik-ligan, menn**

27/02 16.00 SÍ-ÍF
28/02 15.00 Fleyr-Mjølnir

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Tjaldur | 16 | 14 | - | 1 | - | 1 | 477 | 354 | 123 | 29 |
| 2 Stjørnan | 15 | 13 | - | 1 | - | 1 | 440 | 298 | 142 | 27 |
| 3 Neistin | 15 | 8 | - | 0 | - | 7 | 394 | 372 | 22 | 16 |
| 4 VÍF | 15 | 4 | - | 0 | - | 11 | 355 | 425 | -70 | 8 |
| 5 StÍF | 15 | 4 | - | 0 | - | 11 | 357 | 446 | -89 | 8 |
| 6 VB | 16 | 2 | - | 0 | - | 14 | 342 | 470 | -128 | 4 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 15 | 12 | - | 0 | - | 3 | 484 | 394 | 90 | 24 |
| 2 KÍF | 15 | 7 | - | 1 | - | 7 | 389 | 408 | -19 | 15 |
| 3 H71 | 15 | 5 | - | 3 | - | 7 | 400 | 407 | -7 | 13 |
| 4 StÍF | 15 | 6 | - | 1 | - | 8 | 400 | 412 | -12 | 13 |
| 5 Kyndil | 15 | 6 | - | 1 | - | 8 | 358 | 409 | -51 | 13 |
| 6 VÍF | 15 | 6 | - | 0 | - | 9 | 441 | 442 | -1 | 12 |

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 15 | 14 | - | 1 | 43 | 8 | 35 | 17 |
| 2 TB | 15 | 11 | - | 4 | 38 | 18 | 20 | 13 |
| 3 Mjølnir | 15 | 10 | - | 5 | 35 | 21 | 14 | 12 |
| 4 Fleyr | 16 | 9 | - | 7 | 32 | 27 | 5 | 11 |
| 5 Dráttur | 16 | 8 | - | 8 | 31 | 26 | 5 | 11 |
| 6 ÍF | 16 | 2 | - | 14 | 7 | 43 | -36 | 2 |
| 7 KÍF | 15 | 0 | - | 15 | 2 | 45 | -43 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 15 | 12 | - | 3 | 38 | 15 | 23 | 17 |
| 2 SÍ | 15 | 11 | - | 4 | 37 | 20 | 17 | 16 |
| 3 Fleyr | 15 | 6 | - | 9 | 31 | 32 | -1 | 8 |
| 4 ÍF | 15 | 0 | - | 15 | 3 | 42 | -39 | 0 |